## Svika við kvotu

Í Íslandi hava myndugleikarnir skuldsett eitt útgerðarfelag og ein vektarmann á Eysturlandinum fyri at hava brotið galdandi reglur. Sambært blaðnum Vísir hava myndugleikarnir illgruna um, at útgerðarfelagið og vektarmaðurin hava svikað á vektarseðlinum við at skriva, at eitt skip hjá útgerðarfelagnum hevði 600 kilo av lira, hóast talan í var um tosk. Liri er uttan fyri íslendsku kvotuskipanina og telur tí ikki við í kvotuni hjá skipunum.

## Graslíki til Nuuk

Býráðið í Nuuk hevur samtykt, at býurin skal hava ein graslíkisvøll, og kommunan hevur í fyrsta umfari játtað 2,8 mió. krónur til verkætlanina, sigur KNR. Í Grønlandi eru bara grúsvallir, eins og vit høvdu í Føroyum, áðrenn graslíkisvallirnir komu, og grønlendski landsliðsvenjarin, Jens Tang Olesen, hevur sagt, at grønlendskur fótbóltur hevur tørv á betri umstøðum. Kommunan í Nuuk hevur spurt seg fyri í Íslandi og Norðurnoregi um graslíkisvallir.

# Skattalættarnir verða ikki broyttir

**Á fundi í lítlu samgongu í gjár varð sligið fast, at skattalættarnir ikki verða broyttir. - Fundurin var fyri meg ein roynd at fáa samgonguna at finna rætta áralagið aftur, eftir tær ymisku útmeldingarnar, sum hava verið í seinastuni. Og tað haldi eg eydnaðist, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fundur var í lítlu samgongu í gjár.

– Fyri mítt viðkomandi var ætlanin at fáa rætta áralagið aftur í samgonguni. Tað hevur verið eitt sindur turbulent seinastu tíðina við fleiri ymiskum útmeldingum, men nú hava vit róð meginpartin av teininum við góðum áralag, so tað skuldi verið løgið, um vit ikki eisini megnaðu hetta, tað ið eftir er av skeiðinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann vísir á nógva kjakið, sum hevur verið um eitt nú skattalættarnar, og semjuna í samgonguni um, at haldast skal aftur við útreiðsluvøkstrinum á komandi fíggjarlóg.

– Tað hevur altíð verið eitt stríð hjá øllum samgongum at halda aftur í vøkstrinum á fíggjarlógini. Hon hevur ein náttúrligan vøkstur orsakað av lønarvøkstri og vanligari inflatión. Vit skulu eisini minnast til, at ein vøkstur á fíggjarlógini nú kann skunda undir at hita búskapin upp, sigur Jóannes Eidesgaard.

Jóannes Eidesgaard sigur, at tað hevur týdning, at samgongan ikki tosar framvið hvørjum øðrum, men við hvønannan.

– Vit eru samdir um at halda aftur í útreiðslunum, nú skulu vit finna út av, hvussu vit gera tað, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður sigur, at teir hava framt nakrar skattalættar, og tað er serliga at hækka loftið fyri toppskatti úr 175.000 krónum upp í 280.000 krónur.

– Hetta merkir, at ein vanlig arbeiðaraløn ikki longur verður rakt av toppskatti. Og tað er serliga umráðandi nú, tá vit mangla arbeiðsmegi, og tí hava brúk fyri, at fólk arbeiða so nógv sum gjørligt, sigur Jóannes Eidesgaard.



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur, at fundurin í gjár í lítlu samgongu gekk væl, og at allur tvídráttur nú er beindur av vegnum*

### Stuðla barnafamiljum

Løgmaður slær sostatt fast, at skattalættarnir ikki verða broyttir. Hann sigur, at tað sjálvandi altíð ber til at finna lítir við einum skattalætta, um tað er tað, ein ynskir.

– Tað er rætt, at inntøkur undir 140.000 krónur merkja skattalættan í minni mun enn onnur, men hetta kemst av, at so lágar inntøkur mest bara rinda kommunuskatt og bert í minni mun landsskatt. Hartil kemur so, at gjaldið til samhaldsfasta er økt, og tað rakar so eisini lægru inntøkurnar, sigur løgmaður.

Men við lægru inntøkunum er tað soleiðis, at talan í mongum førum er um til dømis hjúnarfelagar, har annar hevur góða inntøku, meðan hin kanska fegin vil vera á arbeiðsmarknaðinum, men til niðursetta tíð. Talan kann eisini verða um eitt nú lesandi, sum nýta summarmánaðirnar at forvinna sær nakað av peningi í, meðan tey lesa restina av tíðini.

– Vit skulu minnast til, at burðaravlopið í Føroyum er tað størsta í Europa, og tað er bert hetta stóra burðaravlop sum ger, at fólkatalið ikki minkar, tí talan er um eina nettofráflyting. Tí er tað av stórum týdningi, at barnafamiljurnar hava tað gott. Og tað er eisini nakað, sum flokkarnir nú innanhýsis skulu kjakast um, antin tað ikki er rætt at veita barnafamiljunum stuðul, sigur løgmaður.

Tað sama er galdandi fyri stakar uppihaldarar, og tað er nakað, sum Hans Pauli Strøm longu hevur arbeitt við, og sum væntandi fer at síggjast aftur á komandi fíggjarlóg.

### Skarva av

– Hetta er sama kjakið sum vit høvdu fyrst á árinum, tá Bárður Nielsen framvegis var fíggjarmálaráðharri. Men tað er lættari at nýta almannalóggávuna til slíkar reguleringar, heldur enn skattalógina, sigur Jóannes Eidesgaard.

Sostatt hevur samgongan í umbúna at lívga um barnafamiljurnar og støku uppihaldararnar, men tað merkir so samstundis, at hyggjast má nærri at, hvar møguligt er at skarva av, so vøksturin á fíggjarlógini kann tálmast.

– Tað verður neyðugt at halda aftur á øðrum økjum, og tað vóni eg fer at eydnast, sigur løgmaður.

Hann vísir á, at tá talan er um at tálma vøkstrinum í útreiðslunum á fíggjarlógini, so er talan um bæði rakstur og íløgur. Og hetta verður so nakað, sum samgongan má loysa, nú byrjað verður at snikka fíggjarlógina fyri komandi ár til í næstu viku.

# Avgjørt ein politiskur trupulleiki

**– Mangulin upp á arbeiðsmegi er ein politiskur trupulleiki, og verður einki gjørt, kann tað fáa álvarsligar, óhepnar avleiðingar, sigur løgmaður**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, er í tí stóra og heila samdur við tí, sum Jóhan Páll Joensen og Bjarni Olsen førdu fram í Degi og Viku í gjárkvøldið.

– Eg vil ikki kalla tað fyri katastrofu, men tað er greitt, at vit mugu viðgerða málið í størsta álvara, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður sigur, at eitt slogan hjá flestu politikarum altíð hevur verið: Arbeiði til allar hendur. Og sigast má, at hesin málsetningur er uppfyltur til fulnar.

– Útlitini vóru annars ikki tey bestu, tá hendan samgongan tók við. Fleiri virkir lógu still og summi gera tað enn. Men nú er so arbeiði til allar hendur og meira til, og tað er ein eitt sindur óvanlig støða, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður sigur, at mangul upp á arbeiðsmegi kann hava óhepnar avleiðingar við sær. Talan kann gerast um lønarglíðingar, sum aftur hevur við sær, at arbeiðir gerast dýrari. Og hetta kann so aftur verða viðvirkandi til eina økta inflatión.

– Tí er neyðugt at taka málið upp í størsta álvara. Ein lóg er á veg, sum eftir ætlan skal koma í gildi á nýggjárinum. Hetta er ein lóg sum gera tað smidligari hjá ES-borgarum at koma til Føroyar. Hon skal til hoyringar hjá øllum pørtum á arbeiðsmarknaðinum, tí tað er umráðandi, at eisini fakfeløgini eru við í hesum ætlanum sigur Jóannes Eidesgaard.

### Smidligari

Løgmaður sigur, at tað er ógvuliga náttúrligt at fokusera upp á europearar.

– Fyri tað fyrsta er væl eingin orsøk til at fara yvir um ánna eftir vatni. Men við at fokusera á europearar fær tú størri mobilitet í arbeiðsmegina. Tí roknast má við, at europearar koma til landið við tí eina endamáli at arbeiða, fyri síðani at fara heim aftur, tá eingin tørvur longur er á fremmandari arbeiðsmegi, sigur løgmaður.

Hann sipar til, at tá ikki-europearar koma til Føroya, so er tað ikki altíð bara fyri at arbeiða, men ofta líka nógv fyri at finna sær eitt nýtt heimland.

– Tá miðað verður eftir europearum, so er tað eisini tí at tað skal virka báðar vegir soleiðis, at eisini føroyingar skulu hava smidliga og lætta tilgongd til aðrar arbeiðsmarknaðir úti í Europa, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Men mangulin upp á arbeiðsmegi í Føroyum er avgjørt ein politiskur trupulleiki, sum nakað má gerast við, heldur løgmaður.



*Gongur sum ætlað, kemur ein nýggj lóg í gildi á nýggjárinum, sum skal gera tað smidligari hjá ES-borgarum at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum*